# Ár teirra brekaðu

JAVNI

## Ráðstevnan: Skúlin fyri øll - hvussu fáa vit hann?

**Ráðstevnan er fríggjakvøldið við almennum og ókeypis fundi í samkomuhøllini á Studentarskúlanum á Kambsdali og á Sjómansskúlanum í Havn leygardagin.**

### Skráin:

**Fríggjakvøldið 14. november**

**Kl 18.45 "Skolen for alle - ideoligiske aspekter".**
Leif A. Fiskvik er pápi 34 ára gamla kvinnu við menningartarni og brekum. Hann er nevndarlimur í Norsk Forbund for Utviklingshemmede (NFU) og hevur sitið í alskyns nevndum hjá Undirvísingar- og granskingarmálaráðum. Er nú rektari á ungdómsskúla i Kristiansund í Norra.
Eftir fyrilesturin er orðaskifti og drekka

**Leygardagin 15. november**

**Ráðstevnuleiðari: Hans Trygvi Teirin, advokatur**

**kl. 9.00 Vælkomin,** Sigrun Wardum, starvsnevndarlimur í Javna
Síðani er morgunmatur

**kl. 9.30 Ráðstevnan verður sett** Annita á Fríðríksmørk, mentamálaráðharri

**kl. 9.45 Sangbólkurin Salt syngur**

**kl. 10.00 Støðan í skúlanum í dag** Óli Wolles, næstformaður í Javna

**kl. 10.20 Ítøkiligar ætlanir á sernámsfrøðiliga økinum**
Hans Eli Dahl, stjóri á Sernámsdeplinum. Orðaskifti

**kl. 10.50 Stuttur steðgur**

**kl. 11.00 Hvad må til, for at det skal være mulig å skape en skole for alle?**
Leif A. Fiskvik úr Norra. Orðaskifti

**kl. 12.00 Døgurði á Læraraskúlanum - Kalt borð**

**kl. 13.00 Vegurin frá serskúla til vanligan skúla. Hvussu loysa vit forðingarnar á vegnum?**
Halldóra Haraldsdóttir, Ísland, er cand. polit, lærari og serlærari. Hon hevur verið rektari á serskúla og í fólkaskúla. Nú er hon lektari á lærara- og pedagogskúlanum á Akureyri í Íslandi. Orðaskifti.

**kl. 14.00 Framtíðarætlanum í sambandi við at undirvísa børnum við serligum tørvi**
Annita á Fríðríksmørk. Orðaskifti.

**kl. 14.30** Kaffi, te og skuffukaka

**kl. 14.45 til 16.00 Bólkaarbeiði**

**Endamál við bólkunum:**
At viðgerða ávís øki innan skúlan meira gjølla **við atliti til at sjónliggera nýtilig amboð!**

- Í hvørjum bólki verða, sum upplegg til orðaskifti, tvey innlegg á ca. 5 min., hildin av ávikavist einum foreldri, og einum lærara / pedagogi / terapeuti.
- Aftaná verður orðið frítt í bólkinum.
- Til at vera íbirtari til orðaskifti og samskipa tað, verður ein sálarfrøðingur til hvønn bólk.
- Skrivari, verður ein lærari. Hesin verður at leggja fram niðurstøðurnar í felagshøllini aftaná.

**1. Fyrireikingar áðrenn barnið fer í skúla**
- Hvørjar hugsanir/ynskir hava foreldur: Sigvør Nesá, Toftir
- Hvat kann verða gjørt áðrenn barnið fer í skúla: Lena Jacobsen, Leirvík

Skrivari: Annlis Bjarkhamar, Vágur
Samskipari: Sigrun Samuelsen, Tórshavn

**2. Fyrstu skúlaárini**
- Foreldraroyndir, hvat var gott! Hvat kundi verið betur? Herfríð Falkvard, Sørvágur
- Hvørji viðurskifti eigur dentur at verða lagdur á! Kristianna Højgaard, Søldarfjørður

Skrivari: Doris Hansen, Tórshavn
Samskipari: Arni Ludvik, Kollafjørður

**3. Seinnu skúlaárini**
- Foreldraroyndir, hvat var gott? Hvat kundi verið betur? Súsanna Petersen Saltnes
- Hvussu fáa vit fólkaskúlaárini at eydnast ?

Skrivari: ?
Samskipari: Heri Kragesten, Tórshavn

**4. Barnið sum ikki megnar vanligan fólkaskúla**
- Foreldraroyndir: Eivind Simonsen, Rituvík
- Hvussu kann ein serstova verða skipað? Hanna Juul, Søldarfjørður

Skrivari: Maud Benjardøgg, Vágur
Samskipari: Óluva Skaale, Tórshavn

**5. Samskipan av degnum, heimið, skúlin og frítíðin**
- Hvussu ynskja foreldur samstarvið? Fríða Mikkelsen, Tórshavn
- Hvørji viðurskifti eigur at verða hugsað um? Olga Eysturstein,Leirvík

Skrivari: Marjun Ziskason, Klaksvík
Samskipari: Ása Ellefsen, Tórshavn

**kl. 16.00 Framløga av bólkaarbeiði**
- Skrivararnir í bólkunum leggja fram niðurstøðurnar
- Tikið verður saman um
- Kjak
- Niðurstøða

**kl. 17.00 Endi** Malena Arnholdsdóttir, formaður í Javna

Ráðstevnan er fyri øll áhugað, men vendir sær serliga til lærarar, serlærarar, pedagogar, lærara- og pedagognæmingar, terapeutar, heilsufrøðingar, psykologar, foreldur, avvarðandi og lands- og komunalpolitikarar.

Luttøkugjaldið íroknað mat er 300 krónur, sum verður at flyta á konto í Føroya Banka kontonr. 153.962.2
Foreldur saman gjalda fyri ein.

**Tilmelding hjá Javna innan 11. november,**
**á telefon 314827, fax. 310557 ella teldupost javni@post.olivant.fo**

Fyri ráðleggingarbólkin hjá Javna
Malena Arnholdsdóttir, formaður

JAVNI

Sosialurin 341800



# Goymslufólk
til Elding í SMS

Vit sóknast eftir einum goymslumanni til Elding í SMS at byrja skjótast tilber.

Vit vilja bjóða tær eitt spennandi starv í einum umhvørvi í støðugari menning.

Tú kemur m.a. at taka tær av goymslustýring, útkoyring av vørum og aðrar fyrifallandi arbeiðsuppgávur.

Vit vænta at tú er ágrýtin og røkin og tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tú hevur góð samstarvsevni, er álítandi og fyrikomandi, hevur teldukunnleika og at tú hevur koyrikort.

Løn sambært nærri avtalu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 21. november 2003 og skal sendast til:

**Elding, Postboks 1289, 110 Tórshavn**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar fáast frá Mads A. Winther, stjóra, á tel. 21 62 30

ELDING
- EIN BETRI LOYSN!

# Sølufólk
til Elding í Klaksvík

Elding í Klaksvík søkir eftir sølufólki at byrja skjótast gjørligt.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert arbeiðspláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu. Tað er ein fyrimunur um tú hevur útbúgving og royndir innan handil og sølu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 21. november 2003 og skal sendast til:

**Elding, Postboks 1289, 110 Tórshavn**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar fáast frá Mads A. Winther, stjóra, á tel. 21 62 30

ELDING
- EIN BETRI LOYSN!

**Heimarøktin øki 5 – Suðuroy**

# Avloysarastarv

Vegna uppskúling verður søkt eftir heilsuhjálpara frá 1. desember 2003 til 15. mai 2004, at arbeiða 20 tímar um vikuna í skiftandi vaktum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til **Økisskrivstovuna**, Jeanna í Lágabø, økisleiðari, tlf. **373907**.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin, øki 5**
**900 Vágur**

**Umsóknarfreist:** 22. november 2003.

# Kunngerð
## frá útskiftingarnevndini fyri Hvalvíkar bygd

Næsti útskiftingarfundur verður í róðrarneystinum í Streymnesi mikudagin 19. november 2003 kl. 10.

Á útskiftingarfundinum verða metingin av kommunalu ognartøkuni og endaligur útskiftingarplanur fyri útskiftingina løgd fram.

Útskiftingin verður endað og latin til ákæru.

N. v.
Øssur Á Midjord,
útsk. form.

# Landsfundurin útsettur
## til 21. - 22. november

**Vegna forfall verður landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum, sum skuldi vera í Hvalba 14. og 15. november útsettur eina viku til 21. og 22. november**

**Føroya Javnaðarflokkur**

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

# Bil til salg



BMW 730i, årgang 1992, 177.000 km, grøn metallak, motor 6 cyl./3000 $cm^3$/188 HK, sælges for højeste bud over 110.000 kr.

Bilen har kørt som ministerbil i Danmark 1992-1997, siden december 1997 kørt på Færøerne som Rigsombudets tjenestebil.

Udstyr: Klimaanlæg, el-drevne ruder, elektronisk temperaturstyring, elektrisk skydetag m.m.

Interesserede kan ringe til Rigsombudet på tlf. 35 12 00, mandag-fredag kl. 10-15.

# Fyrilestur – Landssjúkrahúsið

Týskvøldið klokkan 20.00 fer danski læknin, Øivind K. Mathiasen, at halda almennan fyrilestur um nakka- og bleytholdsskaðar í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.

**Fyrireikararnir**

# Leyst starv

Starv sum happadráttarseljari
**í Klaksvík**
er leyst at søkja.

Setanin er galdandi frá 1. januar 2004 at rokna.

Skrivlig umsókn verður at senda nevndini fyri happadráttin sum skjótast og í seinasta lagi 21. november 2003.

**Nevndin fyri**
**HIN FØROYSKA HAPPADRÁTTIN**
Gundadalsvegur 27
100 Tórshavn

Vit hava

- kotavadmal
- tógv til skjúrt/troyggjur

á goymslu.

Ring og hoyr nærri.
Vit senda um alt landið.

Spf. VEVSTOVAN Mýrifípan
Stoffalág 46
100 Tórshavn
Tel 31 43 35/21 43 35

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir